# Sendistovur

**- Hevur umboðið rætta og holla stuðulin úr Føroya Landsstýri og bert ta tignina, og verður tað brúkt av landsumsitingini í størri mun enn eitt nú fyrri umboðsmaðurin í Keypmannahavn, kann tað vera føroyskari vinnu til almikið gagn. Hægri tign kann tvørtur ímóti gerast meinbogin og forðingin fyri virksemi hansara fyri føroyska vinnu, sigur Kjartan Kristiansen í sambandi við kjakið um sendistovu Føroya í Íslandi**

*Kjartan Kristiansen*





Føroyar hava 3 sendistovur úti í heimi; í Brússel, í London (fyri UK og Írland) og í Keypmannahavn.

Sendistovurnar í Brússel og London halda til á donsku sendistovunum á staðnum, meðan sendistovan í Keypmannahavn heldur til á Norðurbryggjuni, har eisini Íslendska sendistovan hevur valt at verða. Eisini Grønlands Repræsentation i København er flutt oman á Norðurbryggjuna.

Fyrr hevur Føroysk Umboðsstova verið í Aberdeen, til Sofus Poulsen, umboðsmaður Føroya í Bretlandi, legði frá sær fyri aldur. Tá varð so sendistova í Bretlandi sett á stovn og í London.

Áðrenn sendistovan varð stovnsett í Keypmannahavn, høvdu vit sum Grønlendingar Færøernes Repræsentation aðra staðir í býnum. Hon røkti ymisk føroysk áhugamál í Danmark, m. a. ikki minst at upplýsa um føroysk viðurskifti. (Samskiftið millum danskar og føroyskar myndugleikar gekk tó at kalla alt uttan um Færøernes Repræsentation, men hølini vórðu nógv nýtt av Føroya landsstýri og umboðum fyri føroyskar myndugleikar, tá álvarsligar samráðingar fóru fram millum danir og føroyingar í áttati og nítiárunum.)

### Umboðsmenn í Bretlandi og Íslandi

Umboðsstova Føroya í Aberdeen varð sett á stovn undir og eftir seinna veraldarbardaga í sambandi við eitt nú áheitan 26. september 1943 frá Føroya Arbeiðarafelag um at fáa sett ein føroyskan umboðsmann í Íslandi, ið kundi verið Føroyingum til stóra hjálp, bæði hvat viðvíkir arbeiðarum á landi og sjómonnum okkara.

Onnur orsøk var uppskot 30. september s. á. um sendinevnd at tingast við bretska stýrið um innflytingarviðurskifti (kvota) fyri okkara exportvørur og onnur tørvandi vinnumál.

Í desember 1943 heimilaði løgtingið landsnevndini eftir samráðingar við vinnufeløg her í Føroyum at taka avgerð í hesum málum, og at nýta tann pening, sum tørvur er á, at fáa tey framd.

24. juli 1944 verður so við kunngerð settur grunnur á stovn undir landsnevndini, ið skal greiða kostnaðin av at senda umboðsmenn fyri vinnulívið til Íslands og Brettlands. Grunnurin varð fíggjaður við gjøldum frá øllum landingum av ísfiski í Bretlandi (yvirhøvur við 112 sterlingpundum fyri hvørja landing).

Um ársskiftið 1946/47 varð kostnaðurin av hesum báðum umboðsfólkunum gjørdur upp. Umboðsmaður var eftir hesum at døma bert hálvt annað ár í Íslandi, frá 15. juni 1944 til 15. desember 1945.

Harafturímóti byrjaði umboðsmaðurin í Bretlandi seinni, 21. juni 1945, men helt so á, í broyttum líki, til Sofus Poulsen fór frá. Inntøkurnar av frammanfyri nevndu gjøldum vóru eftir tí upplýsta nóg stórar til at bera útreiðslurnar av umboðsmonnum, útflutningsnevndini og sendimonnum til Bretlands og Íslands fram til endan av 1946.

Í staðin fyri, at umboðsmaðurin í Bretlandi kom at sita í London, sum eisini var frammi, kom hann at vera í Aberdeen, til mikið gagn fyri føroyska vinnu, og sjálvt um Oddmar Skarðhamar longu við heimastýrislógini varð settur sum diplomatur undir donsku sendistovuni í London (Sofus Poulsen frá 1. februar 1980), varð umboðsstovan rikin beinleiðis undir Føroya landsstýri og flaggaði við føroyskum flaggi burtur av.

At vinnan hevði størri trupulleikar við fiskasølu og kvotum í Onglandi og ikki stórvegis vinnuligar trupulleikar í Íslandi eftir krígslok, mundi vera orsøkin til, at umboðsmaðurin í Íslandi gavst í 1945.

### Sendistova í Íslandi

At føroyingar seinni, eitt nú í fimti-árunum, og enntá í dag kenna trupulleikar í vinnuligari samvinnu við Ísland, hevur tó ikki ført til, at setan av umboðsmanni Føroya har er komið upp á tal. Í alra flestu førum hava mongu Føroyavinirnir í Íslandi, mongu føroyingarnir har og tað stóra netverk og samstarv, sum hevur verið millum Føroyar og Ísland, gjørt hesar trupulleikar og forðingar til at liva við. Tað skerst heldur ikki burtur, at vit hava stóra góðvild í Íslandi.

Tá Føroya landsstýri eykaði uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 2007 við uppskoti um at seta føroyska sendistovu á stovn í Íslandi, varð víst á, hvussu henda kann hjálpa føroyska vinnulívinum og føroysku almennu skipanini á staðnum.

Hvønn týdning ein føroysk sendistova í Íslandi kann hjálpa føroysku almennu skipanini á staðnum, og hvat hetta virksemi ítøkiliga skal verða, er ringt hjá okkum uttanfyri at duga at meta um.

Men ongin ivi er um, at mong mál kunnu verða greidd og fyrireikað við umboði fyri føroyskar myndugleikar í Íslandi. Treytin fyri hepni í slíkum virksemi er kortini fyrst og fremst, at umboðið verður virt og stuðlað úr Føroyum og av føroyskum myndugleikum. At tað eisini skal verða virt av íslendskum myndugleikum er óneyðugt at nevna.

Uppgávan at hjálpa føroyska vinnulívinum á staðnum er í hvussu so er stór og átrokandi, eitt nú at tryggja, at stirvnið í íslendsku almennu skipanini at broyta hugburð í mun til ætlanirnar í Hoyvíkssáttmálanum, og at gera myndugleikunum heima og í Íslandi vart við forðingar og skipanir, ið ikki eru í samsvari við ætlanirnar um víðkaða heimamarknað okkara og íslendinga.

Tá alt hetta er sagt, stendur eftir spurningurin um, hvønn týdning tað fær fyri virðingina av føroyskum umboðsmanni í Íslandi, um hann/hon hevur diplomatiskan status og flaggar við donskum flaggi. Talan er í hesum viðfangi ikki um, hvat vit í Føroyum halda, men hvussu hetta verður fatað í Íslandi og í íslendska vinnulívinum.

Tað er einki at taka seg aftur í, at ein føroyskur umboðsmaður í Íslandi, sum fer at flagga út við donskum flaggi, tí hetta krevst fyri at fáa diplomatstatus, fær ein stak trupla byrjan. Hann ella hon skal í langa tíð bróta niður ta gáttina, at hann kemur sum danskt/føroyskt umboð og ikki sum føroyska umboðið. Hann/hon kann ikki byggja sítt virksemi upp á ta góðvild, sum er í Íslandi fyri Føroyum, tí hon er ikki til við tí signali, sum verður givið um, at hetta er ikki føroyskt umboð men danskt/føroyskt.

Hevur umboðið hinvegin rætta og holla stuðulin úr Føroya landsstýri og bert ta tignina, og verður tað brúkt av landsumsitingini í størri mun enn eitt nú fyrri umboðsmaðurin í Keypmannahavn, kann tað vera føroyskari vinnu til almikið gagn. Hægri tign kann tvørtur ímóti gerast meinbogin og forðingin fyri virksemi hansara/hennara fyri føroyska vinnu.

# Sál, vilji, og álit – ella spin, gykl og sleiskni?

SJÚRÐUR SKAALE



Góði Páll á Reynatúgvu!

Fáur hevur so ofta eftirlýst professionalismu í almennu miðlunum, sum tú.

Tí eru vit uttan iva í prinsippinum samdir um, at útvarpið ikki átti at gjørt tað til tíðindi, tá ein politikari boðar frá, at hann hugsar um, hvørt hann skal stilla uppaftur ella ei.

Tí slíkt er einans ein roynd hjá politikaranum at fáa umrøðu. At gera seg interessantan. Og so aftur gera seg interessantan, tá hann seinni boðar frá, at hann stillar upp kortini.

Her er jú einki innihald – uttan politikarin sjálvur. Hetta er politiskt gykl, sum einans gagnar honum ella henni, sum setir seg sjálvan í fokus. Og tað skal útvarpið ikki lata seg brúka til.

Tað var hetta eg skrivaði um í bløðunum fríggjadagin.

Og eg rokni við, at vit eru púra samdir um tað.

Altso í prinsippinum.

Problemið er helst, at politikarin í døminum eg nevndi, var Páll á Reynatúgvu.

Og tá broytast tingini, skilst.

Tú svarar mær týsdagin – men tú, sum so ofta hevur at útvarpinum, hevur einki at seta fingurin á í hesum máli. Og teg sjálvan lýsir tú við hesum orðum: "Tað eru fyrst og fremst sál, vilji, og álit, sum eru avgerandi tættir í politikki, sambært mínari sannføring, og í minni mun "spin", gykl og sleiskni fyri øðrum."

Tað er gott at hava hesa sannføring. Tú fylgir henni uttan iva fyri tað mesta. Men var tað hon, sum ráddi í hesum lítla máli? Ella snávaði tú, og lat "spin, gykl og sleiskni fyri øðrum" stýra tær eina veika løtu? Førdi tú politikk? Var nakað innihald? Ella royndi tú bara at fáa umrøðu?

Annars eru í tínum svari fleiri gitingar og illgitingar um meg.

Tað er upp til tín. Men tað er heldur ikki ein stílur, sum hóskar so øgiliga væl til tey lýsingarorð, tú nýtir um teg sjálvan.

Nú var hetta eitt evarska lítið mál. Í størri málum mást tú halda teg til tað, tú rópar tína "sannføring".

## Feigdardagur í Suðuroy 13. februar 2007

Suðuroyggin er øll í sorg
úr Beinisvørði í Eystan Borg,
í hjálparloysi vit gráta.
Hetta, ið hendi hesum brønum,
verður altíð okkum ein gáta.

Eygagóð og sálarglað
tey fóru at spæla henda dag -
óttaðust ongan vanda.
Vit duga ikki á sorg at seta orð,
tí hjálparleys vit standa.

Suðuroyggin er øll í sorg
úr Beinisvørði í Eystan Borg

**Levi**